Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Ruth Vang, løgtingsmaður

Svarari: Kaj Leo Holm Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum

Evni: Skipan við føstum røktarheimslækna

Spurningar:

1. Hvussu gongur við arbeiðinum at seta í verk skipan við føstum røktarheimslækna?
2. Nær væntar landsstýrismaðurin, at skipanin fer at virka?

Viðmerkingar:
22. november í fjør samtykti Løgtingið at taka undir við uppskoti frá Framsókn um at seta í verk skipan við føstum røktarheimslækna.

Orsøkin til uppskotið var, at kommunur og eldrasamstørv kring landið ynskja sær eina skipan, har ellis-og røktarheim hava fastan kommunulækna knýttan at sær. Verandi skipan krevur nógva orku og tíð hjá læknum og starvsfólki á heimunum, sum kundi verið brúkt betur. Skipanin við føstum røktarheimslæknum er roynd aðrastaðni við sera góðum úrslitum. Eitt nú vísa kanningar úr Danmark, at skipanin minkar um innleggingar við 28%, endurinnleggingar við 27%, stutttíðar innleggingar við 14%, umframt at óneyðug heilivágsnýtsla minkar munandi.

Eitt samt Løgting tók undir við uppskotinum, men enn er skipanin ikki farin at virka, og starvsfólk á økinum leingjast at frætta nærri um ítøkiligar ætlanir.
Tí verður spurningurin settur landsstýrismanninum.

Á Løgtingi, 9. august 2021

Ruth Vang